Dimmalætting

6 kr.

NR. 6 TÝSDAGUR 15. JANUAR 1991. 114. ÁRGANGUR

OLJUFÝR

Shell hevur

TERMO TECH

Shell

Tlf. 14711

Valið Javnaðarflokkinum ein pyrrhussigur!? -

Innanhýsis ósemja seinkað nýggjari samgongu!

– Atli Dam gav partamonnum í gjár 24 tímar at koma til sættis, um samgonga verður millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin ella ikki

Leygardagin skrivaðu Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin undir samgonguskjal. Nýggj samgonga skuldi skipast í gjár, men í síðstu løtu varð hetta av ongum. Innanhýsisstrið tók seg upp innan Javnaðarflokkin.

Greitt varð tó, at Atli Dam skuldi gerast løgmaður. Hetta er fimtu ferð, hann tekur við sum løgmaður. 3 ferðir í sjeytiárunum (1970, 1975 og 1979), 1 ferð í áttatiárunum (1985) og nú aftur í 1991.

Sambært samgonguskjalinum er ætlanin m. a. at broyta skattalógin soleiðis, at lagt verður um til bruttoskatt. Hetta er ein skipan, sum í prinsippinum ongar frádráttir hevur – fólk verða skattað av fullari lønarinntøku. Men aðrenn er ætlanin at seta í verk eina skipan um proportionalskatt (lutfalsskatt) – so langt upp, sum forsvarligt er, skal talan verða um sama skattaprosent; bert fyri hægru inntøkurnar verður prosentið hækkað nakað, og helst eingin frádráttur, men samstundis verður eitt ávíst botnmark sett, ið fólk ikki rinda skatt av. Lógin skal hava fyrilit við teimum, ið hava sethúsalán.

Miðað verður ímóti einum lægri skattaprosenti enn í dag – ið hvussu er hjá teimum, ið hava inntøkur niðan fyri 2–300.000 kr., og tekniskt verður borið so í bandi, at farið verður ikki upp um tey 50%, sum higartil hava verið galdandi. Hóast galdandi skattareglur hava hetta ásetta prosentloft, verða fólk tó í fleiri førum skattað hægri.

Atli Dam –

Sambært samgonguskjalinum miða samgonguflokkarnir ímóti, at ongar lønarhækkingar verða fyra tey komandi árini. Flokkarnir síggja helst, at lønirnar lækka, so møguleiki – kanska – verður fyri minni skatti. Men hetta er so eitt av málunum, samgonguflokkarnir ikki kundu semjast um undir samgongutingingunum. Eru tó sinnaðir fyri afturhaldi.

Tá tað ikki verður møguligt at draga rentu av nýtslulánum frá í skatti, fær landskassin meira pening, og haraftrat skal sparast á sjálvari fíggjarlógini, sum verður lækkað nakað í 1991. Síðan er við langtíðarætlanum ætlanin at syrgja fyri at fíggingin er í lagi.

Tað, sum veruliga hendir við rentufrádráttinum er, at toppurin verður kliptur av sjálvari spekulatiónini, sum eisini undanfarna samgonga (Fólkafloks-, Sambands- og Tjóðveldis-) hevði ætlanir um. Og tá hesin frádráttur í prinsippinum skal falla heilt burtur, er har ein fíggingarmøguleiki. Miðast skal eisini ímóti at fáa virksemi í gongd í samfelagnum, sum gevur landskassanum fleiri inntøkur.

Bundna samansparingin verður tikin burtur í stigum. Gott og væl helvtin í ár og restin næsta ár. Við búskaparligu støðuni í huga verður tað hildið rímiligari at taka bundnu samansparingina av stigvíst, tí úteftir hevur tað týdning at vísa eina sparing.

Men 1. januar verður ein onnur bundin samansparing sett í gildi. Samgongan ætlar at seta í gildi løg um ein eykapensjónsgrunn – eitt annað heiti enn samhaldsfastur arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur –, sum lønmóttakarar skulu rinda í og ikki síggja peningin aftur fyrr enn á ellisárum, og summi kanska ongantíð. Verandi bundnu samansparing fær lønmóttakarin aftur á egna bók eftir bert 4 árum.

Lógin um landsbanka skal endurskoðast uttan at heimildirnar í galdandi lóg verða avmarkaðar. Siktið er at fáa bankan at virka. Lógin um bankan varð samtykt á heysti 1978 meðan samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin sat.

Nevnd skal setast at kanna ymsa skráseting, so sum partafeløg, bókhald, bankar, sparikassar o. s. fr., við atliti til alternativar møguleikar. Samgongan hugsar við hesum um møguleikarnar at fáa fíggjarmiðdeplar at virka.

Flokkarnir halda í fyrsta lagi partafelagslógina hava fyri neyðini at verða endurskoðað, tí í mun til øll lond kring okkum er hon ótíðarhóskandi, og galdandi løggáva fordar sparikassunum at luttaka í teirri fígging, teir hava hug.

Fólk skulu hereftir gjalda nýtslugjald fyri ávísar almennar tænastur, sum higartil hava verið ókeypis, eins og ávís galdandi nýtslugjøld skulu hækka til tess at minka um útreiðslur landskassans.

Almennir stovnar skulu effektiviserast og rationaliserast til tess at lækka útreiðslustøðið. Hetta fer at merkja fleiri uppsagnir í almennum størvum.

Galdandi lóg um ráfiskabýti skal avtakast. 30% skulu tvingast gjøgnum eina telefonuppboðssølu. Hetta verður gjørt sum ein roynd í hálvt ár, so ein sær, hvussu hetta ávirkar rávørutilgongdina hjá smærru flakavirkjunum. Vísir nøgdin at liggja niðan fyri ásetta prosenttal, verða onnur tiltøk sett í verk. Í hesum eins og so mongum øðrum førum verður einki ítøkiligt sagt.

Oljuvinnan er í dag ein sera átrokandi spurningur, sum er tengdur at spurninginum um undirgrund og ráevnum í henni. Sum er, er ráðgevari settur at útvega føroyingum neyðugar upplýsingar um oljuvinnuna, men átrokandi er at fáa eina loysn á undirgrundarmálinum, so yvirtøka kann fremjast skjótast gjørligt.

Landsstýrið ætlar at tingast við danir um ein nýggjan stjórnarkarm enn verandi heimastýrislóg. Eftir uppskrift frá Javnaðarflokkinum skal ein nýggj sjálvstýrislóg í stoypiskeiðina, har ikki fleiri listar skulu vera yvir sermál, felagsmál o. tl. Føroyingum skal verða gjørligt at yvirtaka øll málsøki eftir teirri røð, teir sjálvir ynskja.

Sum nevnt varð einki landsstýri valt í gjár. Innanhýsis ósemja í Javnaðarflokkinum um, hvør skuldi í landsstýrið og um býti av málsøkjum, gjørdu, at einki nýtt landsstýri spurdist. Atli Dam gav partamonnunum eina freist uppá 24 tímar, um samgongan millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin skuldi verða egg ella ungi.

pn

Bert Guð veit:

Hvat hendir við oljuprísinum

– Einans Guð veit, um kríggj brestur á, segði ST-aðalskrivarin, Perez de Quellar um vikuskiftið. Brestur kríggj á, so veit eingin hvat hendir við oljuprísinum. At hann fer upp, er eingin ivi um, men hvussu nógv, veit eingin

Í dag er freistin, sum ST hevur sett Irak at taka sínar hermenn út úr Kuwait, úti, og hvat síðani fer at henda veit eingin at siga í skrivandi løtu.

Tað sum eitt møguligt kríggj rakar harðast, er sjálvandi oljuídnaðin.

Prísirnir hækkaðu nógv

Tá kreppan tók seg upp, ruku prísirnir upp, og ráoljuprísurin øktist til tá dupulta. Men síðani tá, hevur ein vant seg við støðuna, og eina tíð eftir innrásina í Kuwait, byrjaðu oljuprísirnir at falla aftur.

Tá prísurin var hægst fyri ráoljuna, var hann góðar 40$ fyri tunnuna. Nú er hann nakrar og tjúgu dollarar fyri tunnuna.

Prísurin á gassolju og bensini fór tilsamans 20% upp, tá prísurin var uppá sítt hægsta.

Fyri skipini, hevur kreppan verið ein dyggur smeitur. Tá økingin á oljuna var hægst, øktist prísurin við 38% pr. litur hjá skipunum. Áðrenn kreppan tók seg upp, skuldu skipini av við 1,59 kr. fyri liturin, og tá prísurin var hægstur, skuldu skipini av við 2,20 kr. fyri liturin. Í løtuni liggur prísurin um 2,01 kr. fyri liturin.

Prísurin á gassolju er tann sami nú, sum við ársbyrjan í 1990, meðan bensinprísurin er nakað hægri.

Orsøkin til, at prísurin lækkaði aftur var tann, at nógv olja var og framvegis er til á goymslu. Eitt kríggj fer sjálvandi at hava við sær, at prísurin hækkar, men hvussu nógv, veit eingin at siga.

Ikki ávirkað prísin enn

– Hóast støðan er spent í løtuni, so hevur hetta ikki enn ávirkað prísin á marknaðinum í Rotterdam, sigur Hjarnar Djurhuus, stjóri í Shell.

Prísurin á gassolju er eitt sindur lægri nú vit eru komin um miðjan januar, enn hann var í byrjanini av januar mánaði. Prísurin á bensini er tó eitt sindur hægri enn í byrjanini av árinum.

Hjarnar Djurhuus, stjóri í Shell

Irak hevur tó hótt við at søkja at oljuídnaðinum á arabisku hálvoynni, um kríggj brestur á, og hvat ávirkan hetta fær, er ringt at siga.

Av samlaðu oljuframleiðsluni í heiminum, eigur OPEC umleið tey 40%. Tað størsta framleiðaralandið í OPEC er Saudi Arabia, sum, eftir at hava økt munandi um framleiðsluna, eigur 8% av framleiðsluni.

Á arabisku hálvoynni eru Iran, Irak, Kuwait og Saudi Arabia tey størstu framleiðaralondini, men tá seinastu tíðina, er lítil olja komin frá Irak og Kuwait.

Saudi Arabia hevur økt munandi um framleiðsluna, so at tað ikki merkist so nógv, at eingin olja kemur úr Irak og Kuwait. Saudi Arabia hevur økt sína oljuframleiðslu við umleið 50%-75% síðani kreppan tók seg upp.

Hetta var gjørligt, tí Saudi Arabia hevur altíð verið tað landið, sum hevur minkað um sína oljuframleiðslu fyri at halda prísinum uppi.

Framleiðslan hjá hesum ríka oljulandi hevur verið um 4 mió. tunnir um dagin, men teir hava kunnað framleitt væl yvir tað dupulta. Teir hava eisini framleitt munandi meir, enn tað teir gera nú. Ídnaðurin hevur tískil eisini verið til reiðar at økja munandi um framleiðsluna.

Prísurin upp

Skal ein vera bjartskygdur og siga, at einki kríggj verður, so fella prísirnir uttan iva.

Verður hinvegin kríggj, so fara prísirnir upp, men eingin veit hvussu nógv, tí tað er ringt at siga og er tengt av, hvussu hart oljuídnaðurin verður raktur av einum møguligum kríggi.

Hjarnar Djurhuus sigur, at tað er eins og Perez de Quellar segði, at einans guð veit, um kríggj verður. So er eisini við oljuprísunum.

klh

Ønskværdigt resultat

DET er begivenhedsrige hændelser, vi er vidne til i disse dage. Betydningsfulde og skæbnesvangre. Herhjemme har vi i løbet af ugeskiftet fået nyt landsstyre, Østersølandet Lithauen har fået den sovjetiske socialistbjørns blodtørstige tænder og kløer at føle igen, efter at landets befolkning for første gang i et halvt århundrede med kommunistisk undertrykkelse igen havde oplevet noget af frihedens sødme nogle måneder. Og i aften udløber fristen for Iraks diktator at trække sine mordhærgende militære erobringsstyrker ud af det lille naboland Kuwait, hvis det ikke skal komme til krig for at få opfyldt FN-beslutningen om tilbagetrækning.

For at tage hændelserne i omvendt rækkefølge, så er den frie verden bekendt med de umenneskelige lidelser, som de irakiske besættelsestropper har forvoldt befolkningen i Kuwait. Men vi ved i skrivende stund ikke, om situationen skal udvikle sig til det allerværste, der kan ske med internationale konflikter, nemlig krig. Der har i de seneste dage været udfoldet store anstrengelser især fra USAs og FNs side, hidtil desværre uden positivt resultat, for at få Irak til at gå med til en fredelig løsning og give slip på nabolandet, som blev erobret med militær magt sidste sommer. Håbet om en mindelig løsning er dog stadig til stede, men det ebber hastigt ud.

Hvad et væbnet opgør kan udvikle sig til, er ikke til at sige. Og selv om de militære operationer i givet fald begrænser sig til de midtøstlige områder, kan de få vidtrækkende konsekvenser af anden art, som vi måske også får at mærke.

De sørgelige begivenheder med den sovjetiske magtanvendelse i de baltiske områder kommer os endda nærmere ind på livet. Her på øerne har vi haft kontakter med og besøg af repræsentanter for bl.a. det kulturelle liv i disse lande, der som nabo har det vældige sovjetrussiske rige, som de også blev opslugt af i begyndelsen af sidste verdenskrig.

For kun et par år siden begyndte Sovjetrusland at løsne sit kommunistiske kvælertag om de østeuropæiske tidligere frie lande, som straks kastede åget og valgte sig nye demokratiske ledere. De tre baltiske lande med Lithauen i spidsen gjorde det samme, og her på Færøerne som i de vestlige lande iøvrigt var man begyndt at vænne sig til en demokratisering af forholdene i Østeuropa, hvor der blev frie politiske udfoldelsesmuligheder med respekt for politiske meningsforskelle. Begivenhederne i weekenden har dog vist, at dette ikke er tilfældet for Sovjetruslands vedkommende, hvor magtanvendelse som hjælpemiddel til fortsat kommunistisk lydighed endnu ikke er ude af billedet, hvad enten det skyldes manglende politisk kontrol over militæret eller militærets undladelse af at akceptere demokratiseringen.

Den tredie begivenhed i weekenden, dannelse af nyt landsstyre herhjemme efter næsten to måneders forhandlinger, kommer næppe til at vække opmærksomhed stort andetsteds end i vore egne nære omgivelser. Men her er det til gengæld ikke uden betydning, hvordan samarbejdet mellem de to tilsyneladende så store modsætninger – men når det kommer til stykket ikke helt så forskelligartede partier – som Socialdemokratiet og Folkeflokken vil arte sig for det økonomisk betrængte færøske samfund i den kommende tid.

Sammentræffet mellem de to tragiske hændelser ude i verden og landsstyredannelsen herhjemme på samme tid får forhåbentlig ingen betydning, og ingen skal være mere tilfreds end os, om resultatet af den sidstnævnte hændelse måtte blive lige så godt som det blev det modsatte af de andre to.

Umskipingarhavnin á Tvøroyri:

Einki virksemi enn

Sáttmálin sum Tvøroyrar Kommuna skrivaði við russar viðvíkjandi Tvøroyri sum umskipingarhavn, varð skrivað á fýra málum: russiskum, føroyskum, donskum og enskum.

Sáttmálin kom í gildi 1. desember, men síðani tá, hevur einki virksemi verið.

Dánjal av Rana, býráðsformaður, sigur, at í hesi tíðini av árinum eru eingir russar við Føroyar. Men einaferð í februarmánaði vera teir aftur um hesar leiðir.

Tí er einki virksemi av umskipingarhavnini byrjað enn.

Ivaleyst er tað í Ruslandi, sum aðra staðni, at í tíðini rundan um ársskiftið er ikki tað stóra virksemið. Frá hálvum desembermánaði fara skipini heim og ein partur av januarmánað fer so við at gera klárt til at fara avstað aftur, heldur Dánjal av Rana.

Høvuðsvinnan hjá russum við Føroyar er svartkjaftur. Sjálvt um russar ofta hava fiska svartkjaft alt árið við Føroyar, so er veiðitíðin serliga um várið.

S

Innbrot í Havn

Heldur ikki fekk Tinganes frið fyri tjóvum

Nøkur innbrot hava verið hetta seinasta vikuskiftið í Havnini.

Onkur hevur m. a. brotið inn í húsini við Kirkjuveg 2. Hvat stolið er, er ikki heilt vist.

Somuleiðis hevur verið brotið inn í Vektar- og Sjóbúðina, sum er undir bygging úti í Tinganesi. Ein rútur er brotin, og onkur hevur veri inni, men tað tykist ikki, sum nakað er horvið.

Í Fútalág hevur verið brotið inn í handilin AMA-billutir, har tjóvur ella tjóvar hava stolið einar kr. 3.000,- í vekslipeningi.

Skutu seyð

Politiið í Runavík sigur frá, at fýra smá bilóhapp vóru í Eysturoynni í hálkuni.

Leygardagin boðaði havnafútin í Fuglafirði frá, at innbrot hevði verið í havnaskrivstovuni náttina til leygardagin. Ein hurð var brotin upp, men har var einki tikið.

Sunnudagin í kirkjutíð boðaði ein bóndi í Fuglafirði frá, at onkur gekk uppi í haganum og skeyt seyð. Tað vísti seg at vera tríggir ungir menn, sum vóru farnir í hagan við byrsu. Og tað hevði eisini eydnast teimum at skjóta eina ær, soleiðis at hon fór rullandi oman av einum hamri.

Politiið fór á staðið, og teir møttu hesum ungu monnunum, tá ið teir vóru á veg omanaftur. Menninir vóru so tiknir og síðani avhoyrdir. Seinni koma teir fyri rættin.

Stak friðaligt

Úr Klaksvík sigur politiið frá, at tað hevur verið ógvuliga friðaligt líka síðani nýggjárið.

Ofta kemur ófriðurin líkasum í tørnum sigur vakthavandi á politistøðini í Klaksvík. Og ofta er ófriðurin upp undir høgtíðirnar. Og tá ið so nýggjárið er farið væl og virðiliga afturum, so legst friðurin yvir býin, og soleiðis hevur tað verið í nógv ár, og sum sagt hevur tað einki undantak verið í ár, – tað hevur stak friðaligt, sigur hann.

S